## Mótmæla á Facebook

Fyrr fóru fólk út á gøturnar ella í bløðini fyri at mótmæla, men nýggjar tíðir skapa nýggjar møguleikar, og nú er tað mest sum einki stríðsmál, sum ikki hevur sín Facebook-bólk. Soleiðis er eisini við umstríddu Halgidagslógini, sum hevur fingið sín mótmælisbólk. Stovnarin av bólkinum er Jacob Mouritz Olsen, og í gjár vóru slakir 400 limir í bólkinum. Bólkurin mælir til, at gamla Halgidagslógin verður dagførd.

## Rás2 sendir úr Íslandi

Fólk frá Rás2 eru í hesum døgum í Íslandi, haðani rásin fer at senda radio í dag og í morgin. Heri Simonsen, Alvin Ellebye Andersen og Mirjam Pætursdóttir (myndin) eru farin við Norrønu til Seyðisfjørðin, og Rás2 sendir haðani í tveir dagar. Í dag verður sent frá klokkan 13 til 17, og í morgin verður sent fyrrapart frá 9 til 12 og seinnapart frá 15 til 17. Tosað verður við føroyingar í Íslandi, fólk umborð á Norrønu og íslendingar við tilknýti til Føroyar.






*Leygarkvøldið ringdi politiið runt til dansistøð og minti tey á at halda halgidagslógina*

# Drekk – men dansa ikki

**DUPULTMORALUR** **Dansistaðið Rex í Havn fekk boð frá politinum um, at tað var brot á halgidagslógina at hava dans seinasta leygarkvøldið, men einki var í vegin fyri at skeinkja**

Randi Jacobsen

Hagidagslógin frá 1923 stýrir, hvat er loyvt at gera halgidagar. Men lógin verður tulkað, og tað er ikki altíð, at tulkingin samsvarar við rúsdrekkalógina.

Hetta kom týðiliga fram leygarkvøldið.

Rex lýsti við, at Showmenn gjørdu comeback fríggjakvøldið við rimmar dansi, og at teir eisini spældu leygarkvøldið.

Tað var alt í lagi at hava dans aftaná midnátt fríggjakvøldið, men ein tíma fyri midnátt leygarkvøldið møtti politiið í Rex og boðaði frá, at tey vóru við at bróta halgidagslógina. Rex mátti gjarna hava opið og skeinkja og spæla stillisligan tónleik, men orkestur mátti ikki spæla

- Soleiðis tulka løgfrøðingarnir hjá politinum halgidagslógina, sigur vakthavandi á politistøðini.

Rúni Djurhuus hevur ilt við at góðtaka tulkingina.

- Vit settu borð á dansigólvið sum vanligt, men valdu at hava livandi tónleik við stórum nøvnum sum Jens Marna Hansen, Kim Hansen, James Olsen og Johannus á Rógvu, Showmenn. Tað er ikki til at fata, at tað skal vera loyvt at hava tónleik, men ikki live tónleik.

- Um Showmenn spæla sangir hjá Kim Hansen live, ella vit hoyra sangin av einari fløgu kann í mínari verð gera akkurá tað sama. Politiið segði, at tað bert var loyvi at hava tónleik, um tað ikki var live. Men hvar stendur tað skrivað? spyr Rúni Djurhuus.

Løgfrøðingarnir tulka lógina sum, at dansur, sjónleikur og konsert eru brot á lógina, men loyvt er at skeinkja og selja mat.

Rúni Djurhuus er ikki blíður.

### Dupultmoralur

- Tað er púra vilt, at tað skal vera loyvt at skeinkja men ikki at spæla tónleik live. Soleiðis sum lógin verður tulkað, mugu fólk gjarna drekka og skrála, men ikki dansa, sigur hann.

Rúni Djurhuus vil vera við, at munur verður gjørdur á dansistøðunum, tí hann veit um onnur dansistøð, sum høvdu livandi tónleik hetta kvøld.

Og hann minnist ilt aftur á politiið seinastu jól.

Hann hevði ráðført seg við advokat sín, sum metti at loyvt var at skipa fyri dansi aftaná midnátt jólakvøld, men so ringdi politiið og boðaði frá, at tað var brot á halgidagslógina at hava dans.

- Vit tordu tí ikki, men onnur skipaðu fyri dansi hetta kvøldið og fingu ongar trupulleikar av tí, sigur Rúni Djurhuus.

Hann sigur, at tey í Rex altíð hava ansað eftir ikki at seta dansi- og skeinkiloyvini í vanda, og tí hava eingir trupulleikar verið, men hann hevur ilt við at góðtaka, at munur verður gjørdur av støðunum.

Sambært Rúna Djurhuus kostaði tað Rex nógv at verða steðgað í at hava dans. Orkestrið skuldi hava sína løn. Nógv fólk komu í dans, og tey komu eisini langvegir, men fleiri vendu í hurðini, tá ið eingin dansur var.

Hetta kvøldið ringdi politiið runt til øll dansistøðini og minti tey á halgidagslógina. Eingin annar hevði nakað tiltak, sigur politiið.

*randi@sosialurin.fo*

**1923**

**Hagidagslógin frá 1923 stýrir, hvat er loyvt at gera halgidagar**

**» Tað er púra vilt, at tað skal vera loyvt at skeinkja, men ikki at spæla tónleik live**

RÚNI DJURHUUS, LEIÐARI Í REX